# Fantasybøkur í SMS



**Á torginum í SMS verður mentanarnáttina eitt forvitnisligt tiltak fyri øll tey, ið eru áhugað í fantasy sjangruni. Samrøða verður við tveir av føroysku fantasy rithøvundunum, Anfinn í Skála og Sólrun Michelsen, og høvi verður eisini at keypa bøkur teirra bílliga**

MENTANARNÁTTIN
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Í sambandi við, at fantasy sjangran hevur vunnið sær pláss ímillum bestumtóktu filmir og bøkur, fer Bókasølan í SMS nú at varpa ljós á júst hetta evnið. Vit kenna øll "Lord of the Rings" og "Harry Potter", men munnu øll vera greið um, at vit eisini hava føroyskar rithøvundar, ið skriva fantasybøkur?

Kl 19.00 fríggjakvøldið fer Hans Tórgarð at lesa brot úr bókini "Artemis Fowl", ið seinni í juni mánað kemur út á føroyskum. Hetta er ein heimskend bók, ið er um at vinna sær sæti ímillum bøkur sum Harry Potter og Lord of the Rings.

Gunnar Hoydal fer so at hava samrøðu við Anfinn í Skála og Sólrun Michelsen á pallinum í SMS. Tey hava bæði skrivað tvær bøkur í fantasy sjangruni, Anfinnur hevur skrivað "Heimurin Forni 1 og 2" og Sólrun "Hin útvaldi/Geislasteinar.

At enda fer Hanus Kamban at hava ein lítlan fyrilestur um um fólk, huldufólk og aðrar verur í bókaheiminum.

Føroysku famtasy bøkurnar verða seldar fyri serprís, Heimurin Forni 1 og 2 fyri 200 kr, og Hin útvaldi/Geislasteinar fyri 125 kr.
























